## Spurningar og svar í samband við útboð av Talgildum Samleika

(spurnarumfar 3, tann 15. mai 2017)

| Dato móttikið | Spurningar | Svar |
|---|---|---|
| 15.5.2017 | Viðvíkjandi starvsfólka-identiteti nevnt í FK046. Skal hetta skiljast sum ein identitetur hjá einum starvsfólki (sum ein likamligur persónur) ella ein virkis-identitetur (sum ein juridiskur persónur) ? | Talan er um eitt starvsfólk, sum ein likamligur persónur, og ikki ein identitetur fyri eitt virki (juridiskur persónur) |
| 15.5.2017 | Hvussu skal FK017 skiljast? Skal eitt RA starvsfólk nakrantíð "anmode" ein brúkara um at broyta upplýsingar? Er tað ikki altíð hinvegin runt? | Tað er rætt, at tað sum útgangsstøði er brúkarin sjálvur, sum broytir upplýsingar ella skal geva samtykki broytingar. Hvørjar upplýsingar, talan er um, veldst um lóggeving og hvørjar upplýsingar, vit koma at goyma/dagføra. Kravið verður ikki høgt raðfest. |
| 15.5.2017 | Viðvíkjandi kravi FK019 og FK021. Hvussu tosa orðini "deactivating" og "reactivate" saman? Tað er ikki møguligt, at reaktivera ein identitet sum er blivin deaktiveraður (revoked). | FK021: skal skiljast sum tað stendur í øðrum afsnitti:<br>*"Identities are reactivated based on the same authorization requirements that apply for creating identities."*<br>*Her hugsa vit meira um suspendering*<br>Tvs. Her er talan um at identitetur skal endurnýggjast – ikki bert re-aktiverast. |
| 15.5.2017 | Viðvíkjandi kravi FK019: Hvussu long tíð skal ganga í mesta lagið ganga, aðrenn sertifikati skal reaktiverast? | Vit hava ikki skrivað eitt ávíst tal minuttir, men hetta skal kunna henda sera skjótt. Hetta viðvíkur ikki menningini av loysnini, men skal avgreiðast tá mannagongdir rundan um loysnina skulu gerast. Er t.d. talan um eina sertifikat-baseraða loysn, so skal sertifikatið á CRL alt fyri eitt. |
| 15.5.2017 | CMS019: Hvussu skal hetta krav skiljast? | Talan er um eitt generelt CMS krav og skal bert svarast í tann mun, tað er relevant. Kravið er ikki høgt raðfest. |
| 15.5.2017 | Hvørji dokumentir um mannagongdir rundan um loysnina, t.d. CA-politikkir osv. væntar Gjaldstovan at fáa frá veitaranum í tilboðnum? | Vit vænta ikki at fáa dokumentir um mannagongdir frá veitaranum í tilboðnum (um hetta ikki verður specifikt umbiðið í onkrum kravi). Hetta er sum útgangspunkt ein uppgáva hjá Gjaldstovuni, møguliga í samstarvi við veitaran seinni. |
| 15.5.2017 | Viðvíkjandi persónupplýsingar og autentifikatión. Er møguligt hjá brúkaranum av TS at avmarka atgongdina hjá tænastuveitarum til upplýsingar? | Tænastuveitarnir skal fáa minst møguligt av persónupplýsingum, og bert tað, ið er neyðugt fyri viðkomandi. Hvussu hetta skal gerast, skal avklárast í agilu processini. |

| | | |
|---|---|---|
| 15.5.2017 | Input frá veitara viðvíkjandi kravi NFK027: Mælt verður til at síggja burtur frá hesum kravi, og bert logga um ein autentifikation ella signering er farin fram. Allir aðrir upplýsingar burdu farið umvegis “Heldina” og ikki loggast centralt. | Gjaldstovan tekur hetta til eftirtektar og veitarar kunnu síggja burtur frá hesum kravi í fyrsta umfari. |
| 15.5.2017 | Skal borgarin kunnu brúka sín privat lykil til at kryptera við til aðrar tænastur, uttanum Talgilda Samleikan. | Privat lykil til signering ella autentifikatión mugu ikki nýtast til onnur endamál enn ávíkavist signering og autentifikatión. |
| 15.5.2017 | Input frá veitara: Vit anbefala, at Talgildu føroyar fylgja væl við hvat hendir í norðurlendska samstarvinum á hesum øki. | Gjaldstovan luttekur í norðurlendska samstarvinum og fylgir gongdini nær. |
| 15.5.2017 | Viðmerking frá veitara viðvíkjandi fylgiskjali 7 – Afprøvning: Hetta fylgiskjal er sera umfatandi, meir enn sæð í Føroyar áður. Tað er eingin føroyskur veitari, sum klárar at lyfta hesa uppgávuna sjálvur. Mett verður, at hetta er úti av proportiónum, og viðførir stórar eyka útreiðslur. | Tá Talgildi Samleikin er ein so samfelagskritisk loysn, verður hetta støðið av test mett at vera neyðugt.<br><br>Gjaldstovan metir at test fer at krevja dedikeraðar og kvalifiseraðar test ressursir, við nógvum royndum á hesum øki. |
| 15.5.2017 | Er møguligt at gjøgnumganga fylgiskjal 4, um prísir og gjaldsætlan, nærri? | Fylgiskjalið bleiv gjøgnumgingið á spurnarfundinum, og m.a. bleiv sagt, at tað er upp til veitaran at avgera, hvat skal flokkast sum fastprísur og hvat er tímabaserað.<br>Eisini kom fram, at grein 5 “Øvrige konsulentydelser” ikki skal roknast uppí hini prísestimatini, men verður vurderað fyri seg. |
| 15.5.2017 | Nær verður farið í gongd við at gera sertifikat profilar? | Hetta er eitt síðuprojekt til menningina av loysnini, og fer væntandi í gongd eftir summarferiuna. |
| 15.5.2017 | Vil Talgildu Føroyar taka sær av samleikanum (design, logo osv.) ella skulu vit sum veitarar taka okkum av hesum? | Menning av brandi, so sum logo, design osv. skal sum útgangspunkt gerast av Gjaldstovuni, meðan user interface skal veitarin standa fyri (agile). |